ØYGGJA TÍÐINDI

**Blaðstjórn í Saltangará:**
**Vilmund Jacobsen**, blaðmaður
Box 90, Tlf. 4-7877

**Blaðstjórn í Tórshavn:**
**Áki Bertholdsen**, blaðmaður
**Dan Klein**, blaðstjóri (ábyrgd)
R.C. Effersøesgøta 16
Box 312, Tlf. 1-4411 og 16411

**Lýsingar og lay-out:**
**Dan Klein**
R.C. Effersøesgøta 16
Box 312, Tlf. 1-4411

**Avgreiðsla:**
R.c. Effersøesgøta 16
Box 312, Tlf. 1-4411

Útgávan og uppseting: **P/F Oyggjatíðindi**
Prent: **Dimmalætting**

OYGGJATÍÐINDI kemur út mikudag og fríggjadag og er óheft politiskt og átrúnaðarliga.


# Vísa ans

Lyktakanningin í ár hevur sligið væl út.

Gott og væl helmingurin av øllum bilparkini hevur verið á verkstaðunum kring landið og kannað lyktirnar, og fullfíggiliga er hetta eitt úrslit, sum aðrir neyvan kunnu gera okkum eftir.

Tað er hent at frættast um, at tann føroyski bilførarin er farin at vísa eitt sindur av skynsemi og leggur seg eftir at hava hesi viðurskiftini í lagið.

Ti tað er óneyðugt at minna á, hvørjar syndarligar avleiðingar eitt ljós, sum lýsir út av lagið, kann hava.

Og politið ger sítt til at fylgja kanningini upp, við at halda fram við kanningini og geva bilførarum við skeivari ljósføring ein seðil, sum skuldi minnt teir á, at eisini teir áttu at havt verið til kanning.

Men enn koyrir helmingurin av bilunum í Føroyum við skeivari ljósføring. Møguliga hava teir ikki gjørt sær greitt, hvørjar vansar hetta kann føra við sær, men teir eiga at vita, at teir sýna vanalagt vanvirði við ikki at hava hesi viðurskiftir í lagi.

**Valuta**.

| Seðilverð fyri útlendskan valuta: | 30.11.82 | 10.12.82 |
|---|---|---|
| US-dollars | 877,95 | 861,20 |
| Pund Sterling | 1414,40 | 1391,70 |
| D-mark | 351,80 | 392,05 |
| Svenskar krónur | 117,83 | 116,95 |
| Norskar krónur | 123,85 | 122,65 |
| Franskir francar | 124,53 | 124,55 |
| Belgiskir francar | 17,95 | 17,97 |
| Schweiziskir francar | 410,00 | 414,56 |
| Gylden | 319,38 | 320,33 |
| Lire | 0,6113 | 0,6116 |
| Finnmark | 161,00 | 160,45 |
| Íslendskar krónur | 55,30 | 53,60 |
| Eysturríkskir Shill. | 50,11 | 50,14 |
| Pesetas | 7,43 | 6,71 |
| Escudos | 9,58 | 9,31 |
| Canadiskir dollars | 707,10 | 695,30 |
| Japanskir yen | 3,4845 | 3,5285 |
| Írsk pund | 1187,00 | 1177,00 |

**Diskonto hjá Nationalbankanum: 11**

# Kristian givið fjórðu plátuna út

**Live upptøka úr útvarpshøllini, sum er framúr vælegnað**

— Nýggja útvarpshøllin er framúr vælegnað til at taka plátur upp í.

Tann, sum sigur hetta, er eingin ókunnugur innan føroyskan tónleik, men hin royndi Kristian Blak Nielsen, sum júst nú hevur givið sína fjórðu LP plátu út við egnum tónleiki. Hesaferð royndi hann útvarpshøllina at taka upp í.

— Útvarpshøllin er sera vælegnað at gera upptøkur í, sigur hann. Tað hevur annars ikki verið gjørligt at gera góðar Live upptøkur í Føroyum áður, men við útvarpshøllini hava vit fingið eitt hóskandi hølí, sigur hann.

Plátan, sum Kristian nú hevur givið út, er verkið »Ravnating«. Plátan varð upptikin, tá verkið varð framført í útvarpshøllini í summar.

Tónleikurin á »Ravnatingi« er ein blandingur av improvisatión og klassiskum og tónleiki, har inspiratiónin er heintað úr kvæðunum.

— Ravnarnir, sum hittast á Ravnatingi, umboða bæði fuglarnar sjálvar og teirra univers og samstundis summar av teimum ímyndingum, sum menniskja hevur um teir, sigur Kristian Blak.

— Sagnir og søgur, gamlar og pátrúgv eru tíkar og skaldsligar myndir av fólkahuganum, men hartil kemur, hvussu hitt einstaka menniskja metir og virðir ravnin, og tí ger hann enn meira hugtakandi og gátuføran, sigur Kristian Blak.

»Ravnating« er søga, hugflog og veruleiki. Hetfini á satsunum seta tankarnar í gongd úr einum ávísum stað, men eru opin og lata hvønn einstakan sleppa hugsan síni um ravnin, har honum hóvar.




**TÓNLEIKUR OG MYNDIR**

Men »Ravnating« er annað og meir enn eitt tónleikaverk. Tað er eisini eitt ljósmyndaverk.

Tað er franski fotograturin Philippe Carré, ið býr í Føroyum, sum hevur tikið ljósmyndirnar í verkinum.

»Ravnating« er framførd fleiri ferðir í útvarpshøllini og í Perluni.

Plátan kostar 90 kr., men við at leggja 50 krónur á borðið afturat,

Framh. á síðu 10

# Býtir endurskin út í skúlunum

Felagið Barnabati hevur latið eitt endurskin gera, sum í hesum døgum verður býtt út í skúlunum í Føroyum.

Endurskinið er búmerkið hjá Barnabata, sum hevur givið tey út í samráð við Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Útgávan er stuðlað av Vanlukkutryggingini og Tryggingarsambandinum, sigur Barnabatið.

— Orsøkin til at Barnabati fer inn á hetta økið, er at ikki er ov mikið kann gerast við barnsins tryggleika í ferðsluni.

Barnabati metir, at endurskinini, ið higartil eru komin á marknaðin, hava verið sera væl umtókt og eisini væl brúkt, men tað vísir seg, at tey ov lætt bliva burtur.

Av hesi orsøk roynir Barnabati eitt endurskin, ið er meiri haldbart.

Endurskinini eru til at býta millum øll skúlabørn í Føroyum, og biður Barnabati skúlarnar um at átaka sær hesa uppgávuna.

**SEYMA Í SKÚLANUM**

Tað ræður um skjótast gjørligt at seyma endurskinsmerkini á klæðini hjá børnunum, og ikki lata tey liggja onkustaðni í gagnloysi.

— Ein møguleiki var kanska tann, at hetta varð gjørt í sjálvum skúlanum, í handarbeiðstímanum, soleiðis at børnini sjálvi vóru við til at tryggja seg við endurskinum ta myrku tíðina á árinum.

— Lat okkum vakna læra børnini at tryggja seg í ferðsluni, sigur Barnabati.



*Endurskinið, sum Barnabatið hevur givið út.*